# Kunngerðablaðið A

2009 Hefti 26

ISSN 0907-905X


Nr. 130

30. september 2009

**Kunngerð**
**um**
**hvat ferðandi kunnu flyta inn toll- og avgjaldsfrítt til Føroya**

Við heimild í § 6, litra a og § 36, stk. 2 í løgtingslóg nr. 121 frá 23. desember 1991 um toll verður ásett:

**§ 1.** Ferðandi, ið hava fylt 18 ár, kunnu flyta inn toll- og avgjaldsfrítt til egna nýtslu:
1) Rúsdrekka yvir 22 rúmprosent alkohol:
í mesta lagi 1 litur hægst 60 rúmprosent alkohol.
2) Heitt vín o.a. ikki yvir 22 rúmprosent alkohol:
í mesta lagi 1 litur, ella borðvín í mesta lagi 2 litrar.
3) Øl:
í mesta lagi 2 litrar (6 fl.) hægst 5,8 rúmprosent alkohol.

**§ 2.** Ferðandi, ið hava fylt 18 ár, kunnu flyta inn toll- og avgjaldsfrítt:
1) Sigarettir:
í mesta lagi 100 stk., ella
2) Sigarillos:
í mesta lagi 100 stk., ella
3) Sigarir:
í mesta lagi 50 stk., ella
4) Tubbak:
í mesta lagi 250 gr.

**§ 3.** Ferðandi kunnu flyta inn toll- og avgjaldsfrítt:
1) Luktilsi:
í mesta lagi 50 gr.
2) Rakivatn:
í mesta lagi 25 cl.
3) Sukurlátavørur:
í mesta lagi 3 kg.
4) Sodavatn:
í mesta lagi 10 litrar.

*Stk. 2.* Ferðandi kunnu umframt nevndu vørur flyta inn toll- og avgjaldsfrítt aðrar vørur, sum tilsamans hava virði, ið ikki er hægri enn 2.500 kr

**§ 4.** Vøra, ið hevur hægri virði enn 2.500 kr., kann ikki flytast inn toll- og avgjaldsfrítt, men skal tollast í síni heild av samanlagda virðinum.

**§ 5.** Vøra, ið hoyrir saman sum ein eind, kann ikki flytast partvíst av einum ella fleiri ferðandi toll- og avgjaldsfrítt, sjálvt um virðið á hvørjum parti sær er lægri enn 2.500 kr.

**§ 6.** Toll- og avgjaldsfríur innflutningur av omanfyrinevndu vørum verður bert játtaður einum ferðandi einaferð um samdøgrið.

*Stk. 2.* Treytin fyri toll- og avgjaldsfríum innflutningi er, at vørurnar eru til egna nýtslu og ikki til sølu ella annað vinnuligt endamál, og at hin ferðandi hevur vørurnar hjá sær í sínum persónliga viðføri, soleiðis at vørurnar verða vístar fram til tollviðgerð á staðnum.

*Stk. 3.* Vørur, ið havdar verða fyri onnur ella verða sendar sum ferðagóðs, lúka ikki treytirnar fyri toll og avgjaldsfríum innflutningi.

*Stk. 4.* Vørur, ið koma inn í landið sum ferðagóðs, og síðani verða sendar aftur til seljaran uttanlands til umbýting o. a., skulu gjalda toll- og avgjøld, tá ið vøran kemur aftur til Føroyar.

**§ 7.** Ferðandi, ið taka við sær vørur umframt tær omanfyri nevndu, ella aðrar vørur, ið hava hægri virði enn 2.500 kr., hava skyldu óbiðin at siga tollvaldinum frá.

**§ 8.** Tollvaldið hevur rætt at kanna persónar, viðføri og flutningsfør, sum koma og fara. Ferðandi skulu, tá ið tollvaldið krevur tað, uppgeva navn og bústað.

**§ 9.** Ferðandi skulu sjálv steðga upp til eftirlit, og tá ið tað verður kravt, pakka upp og aftur, tað sum kravt verður til eftirlit, og hava skyldu til at geva upp fyri tollvaldinum allar lutir og vørur, sum tey hava við sær úr útlondum, eins og tey hava skyldu til at siga frá øllum av týdningi fyri tollviðgerðina.

**§ 10.** Brot á §§ 1-9 í hesi kunngerð verður revsað við sekt. Revsing kann ásetast sum bót fyri tann, ið við tilætlan til ella av grovum ósketni brýtur reglurnar.

**§ 11.** Henda kunngerð kemur í gildi 1. januar 2010. Samstundis fer úr gildi kunngerð nr. 103 frá 1. desember 2008 um hvat ferðandi kunnu flyta inn toll- og avgjaldsfrítt til Føroya.

Fíggjarmálaráðið, 30. september 2009

**Jóannes Eidesgaard (sign.)**
landsstýrismaður

/ Petur Alberg Lamhauge (sign.)

Nr. 131 30. september 2009

**Kunngerð**
**um**
**stuðul til ferðaútreiðslur og dupult húsarhald**

Við heimild í § 4, stk. 3 og § 7, stk. 4 í løgtingslóg nr. 93 frá 6. juni 1997 um stuðul til ferðaútreiðslur og § 2, stk. 3 og 4, § 4, stk. 3 og § 7, stk. 4 í løgtingslóg nr. 95 frá 6. juni 1997 um stuðul til dupult húsarhald verður ásett:

**§ 1.** Sambært § 4, stk. 1 og 2 í lógunum verður stuðul bert veittur eftir umsókn. Serligt umsóknarblað skal nýtast, tá søkt verður um stuðul.

**§ 2.** Fyri útreiðslur í sambandi við dupult húsarhald eru hesar stuðulsupphæddir ásettar:
1) Fyri leigu av høli er upphæddin 488 kr. um mánaðin.
2) Fyri eykaútreiðslur til kost er upphæddin 20,50 kr. fyri hvønn arbeiðsdag.
3) Innlendis ferðing aftur og fram eina ferð um vikuna, útroknað eftir løgtingslóg um stuðul til ferðaútreiðslur.

*Stk. 2.* Minstaupphæddin, ið viðkomandi sjálvur skal bera, er ásett til 850 kr. fyri stuðulsskeiðið. Stuðulsskeiðini eru frá 1. januar 30. juni og 1. juli 31. desember.

**§ 3.** Tað er ein treyt fyri at fáa ferðastuðul, at arbeiðsgevari umsøkjarans á umsóknini váttar, at viðkomandi arbeiðir hjá honum. Stuðul til dupult húsarhald er treytaður av, at útleigarin á umsóknini váttar, at tær av umsøkjaranum givnu upplýsingar viðvíkjandi íbúð og leigutíð eru rættar.

**§ 4.** Stuðul verður ikki veittur persónum, ið hava rætt til endurgjald á annan hátt fyri ferðaútreiðslur ella útreiðslur í sambandi við dupult húsarhald, eins og ein ikki kann fáa stuðul til ferðaútreiðslur í størri mun enn ásett í § 2 í lóg um stuðul til ferðaútreiðslur og stuðul til dupult húsarhald í størri mun enn ásett í § 2.

**§ 5.** Avgerðir tiknar sambært løgtingslóg um stuðul til ferðaútreiðslur og løgtingslóg um stuðul til dupult húsarhald kunnu innan 4 vikur kærast til Skatta- og Avgjaldskærunevndina. Kæran skal vera skrivlig og grundgeving fyri kæruni skal vera við.

*Stk. 2.* Freistin í stk. 1 verður roknað frá tí degi, kærarin hevur fingið fráboðan um avgerðina.

**§ 6.** Henda kunngerð kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd. Samstundis fer úr gildi kunngerð nr. 132 frá 27. desember 2006 um stuðul til ferðaútreiðslur og útreiðslur til dupult húsarhald.

Fíggjarmálaráðið, 30. september 2009

**Jóannes Eidesgaard (sign)**
landsstýrismaður

/ Petur Alberg Lamhauge (sign)

Nr. 132 5. oktober 2009

# Kunngerð um sjúklingaráðgevar

Við heimild í § 29 í anordning nr. 185 frá 13. mars 2009 om ikrafttræden for Færøerne af lov om anvendelse af tvang i psykiatrien verður ásett:

## Kapittul 1 Útnevning av sjúklingaráðgevum

**§ 1.** Sambært § 25, stk. 1 í anordning om ikrafttræden for Færøerne af lov om tvang i psykiatrien útnevnir Føroya Kærustovnur eftir umsókn ávíst tal av sjúklingaráðgevum.
*Stk. 2.* Leys størv sum sjúklingaráðgevar verða lýst í fjølmiðlunum. Lýsast kann eisini í faktíðarritum ella á annan hátt, sum kann tryggja, at teir fakbólkar, haðani møguligir sjúklingaráðgevar serliga kunnu hugsast at vera útnevndir sbrt. stk. 3, fáa kunnleika til lýsingina.
*Stk. 3.* Sjúklingaráðgevar verða útnevndir millum teir umsøkjarar, sum mugu haldast at vera serliga væl egnaðir til at røkja tær uppgávur, sum eru í starvinum, her ímillum persónar við tilknýti til heilsu-, almanna- og undirvísingarverkið.
*Stk. 4.* Persónar, sum eru í starvi á psykiatriskum sjúkrahúsi ella sjúkrahúsdeild, kunnu ikki útnevnast sum sjúklingaráðgevar fyri persónar á sama sjúkrahúsi ella somu deild. Tað sama er galdandi fyri persónar, sum annars hava við raksturin ella umsitingina av sjúkrahúsinum ella deildini at gera.
*Stk. 5.* Talið á persónum, sum verða útnevndir sum sjúklingaráðgevar, verður ásett av Føroya Kærustovni við støði í einari meting av tørvinum.

**§ 2.** Føroya Kærustovnur ger ein lista við teimum útnevndu sjúklingaráðgevunum við upplýsingum um navn, bústað, telefonnummar, arbeiðspláss og telefonnummar á arbeiðsplássi.
*Stk. 2.* Føroya Kærustovnur sendir listan til sjúkrahúsið, sum gevur hann víðari til tær psykiatrisku deildirnar.
*Stk. 3.* Um broytingar verða á listanum, ger Føroya Kærustovnur nýggjan lista, ið verður sendur út sum ásett í stk. 2.

## Kapittul 2 Tilnevning av sjúklingaráðgevum

**§ 3**. Ein sjúklingaráðgevi skal tilnevnast einum persóni, sum verður tvingsilsinnlagdur, tvingsilsafturhildin ella verður fyri tvingsilsviðgerð, tvingsilsfastspenning, nýtslu av kropsligari megi, verjufastspenning, nýtslu av persónligum ávaringar- og peiliskipanum og serligum hurðalásum, persónligari avbyrging, sum uttan steðg varir í meira enn 24 tímar, ella læsing av hurðum á deildini sambært § 18 e, stk. 1, nr. 2 í lógini uttan so, at sjúklingurin longu frammanundan hevur ein verja.

**§ 4.** Tá talan er um tvingsilsinnlegging og tvingsilsafturhaldan, verður tilnevningin framd í sambandi við, at frælsistøkan byrjar.
*Stk. 2.* Er talan um onnur tvingsilsinntriv, verður tilnevningin framd, tá avgerðin um tvingsilsinntrivið er tikin.

**§ 5.** Tilnevning í tí einstaka førinum fer fram á tann hátt, at vakthavandi sjúkrarøktarfrøðingurin skjótast gjørligt kunnar tann sjúklingaráðgeva, sum á listanum yvir sjúklingaráðgevar stendur fyri tørni at verða tilnevndur, um tvingsilsinntrivið og um, at viðkomandi er tilnevndur fyri sjúklingin. Hevur sjúklingurin áður undir innleggingini havt tilnevndan sjúklingaráðgeva, skal hesin vanliga tilnevnast.
*Stk. 2.* Áðrenn tilnevning fer fram, skal sjúklingurin hava høvi at siga sína hugsan um ætlaðu tilnevningina.
*Stk. 3.* Setir sjúklingurin fram ynski um at fáa tilnevndan annan sjúklingaráðgeva, sum er á listanum, skal hetta játtast, um tað er gjørligt. Avgerðin kann kærast til Føroya Kærustovn, sum tekur ta endaligu fyrisitingarligu avgerðina.
*Stk. 4.* Ynskir sjúklingurin annan persón tilnevndan, ið ikki er á listanum yvir sjúklingaráðgevar, verður ein fyribils tilnevning framd av tí persóni, sum stendur fyri tørni sbrt. stk. 1. Føroya Kærustovnur tekur avgerð um, hvørt tann persónurin, sum sjúklingurin ynskti at fáa, kann tilnevnast. Ynski hjá sjúklinginum skal eftirlíkast, uttan so, at hetta ikki er ráðiligt.

**§ 6.** Uttan so, at sjúklingurin beinleiðis biður um tað, kann tilnevning av einum sjúklingaráðgeva, sum er á listanum yvir sjúklingaráðgevar, ikki fremjast, um tað grundað á starvið ella líknandi, herundir t.d. at viðkomandi innan almannaverkið er málsviðgeri hjá sjúklinginum, eru umstøður, sum kunnu sáa iva um, hvørt viðkomandi kann røkja áhugamálini hjá júst hesum sjúklingi á nøktandi hátt.

**§ 7.** Tilnevning verður vanliga framd umvegis telefon, men skal síðani váttast skrivliga. Vakthavandi sjúkrarøktarfrøðingur skal tryggja sær, at sjúklingaráðgevin ikki er tarnaður orsakað av, at hann t.d. er burturstaddur, sjúkur ella líknandi.
*Stk. 2.* Sjúklingaráðgevin kann nokta at taka við tilnevning, um hann longu er tilnevndur fyri aðrar sjúklingar.

**§ 8.** Ein áheitan frá sjúklinginum um at fáa ein

frammanundan tilnevndan sjúklingaráðgeva útskiftan við ein annan, sum er á listanum yvir útnevndar sjúklingaráðgevar, skal verða játtað, uttan so, at hetta ikki verður mett at vera rímiliga grundað. Noktan av slíkari áheitan kann kærast til Føroya Kærustovn.
*Stk. 2.* Ein áheitan frá sjúklinginum um at fáa ein frammanundan tilnevndan sjúklingaráðgeva útskiftan við ein annan, sum ikki er á listanum yvir útnevndar sjúklingaráðgevar, kann bert játtast, um tað er íkomin ósemja millum sjúkling og sjúklingaráðgeva og um tann persónurin, sum sjúklingurin ynskir tilnevndan, kann metast at vera fúsur og egnaður til at virka sum sjúklingaráðgevi fyri sjúklingin. Avgerðin verður tikin av Føroya Kærustovni.

## Kapittul 3
## Uppgávur og heimildir sjúklingaráðgevans

**§ 9.** Sjúklingaráðgevin skal í mest møguligan mun virka í samráð við sjúklingin.

**§ 10.** Tá uppgávur verða loystar, sum hava sín uppruna í § 24, stk. 2 í lógini, skal sjúklingaráðgevin m.a. hava eftirlit við, at tað tvingsilsinntrivið, sum er orsøk til tilnevningina, ikki varir longri enn neyðugt.
*Stk. 2.* Sjúklingaráðgevin skal vegleiða og ráðgeva sjúklinginum í øllum viðurskiftum í sambandi við innlegging, uppihald og viðgerð á psykiatriskari deild. Sjúklingaráðgevin skal harumframt hjálpa sjúklinginum við at byrja og fremja møguligar kærur. Sjúklingaráðgevin skal í mest møguligan mun vera til staðar, tá kæran verður viðgjørd í psykiatrisku sjúklingakærunevndini.

**§ 11.** Fíggjarligu viðurskiftini hjá sjúklinginum og onnur persónlig viðurskifti, sum ikki viðvíkja innlegging, uppihaldi og viðgerð á psykiatriskari deild, eru ikki partur av uppgávunum hjá sjúklingaráðgevanum.

**§ 12.** Sjúklingaráðgevin skal skjótast gjørligt aftan á tilnevningina vitja sjúklingin og alla tíðina hava samband við hann. Fyrsta vitjanin skal vera innan 24 tímar aftan á tilnevningina. So leingi tvingsilsinntrivið stendur við, skal vitjan vera minst eina ferð um vikuna og annars eftir tørvi.
*Stk. 2.* Sjúklingaráðgevin hevur rætt til frítt og ótarnað, persónligt, skrivligt og telefoniskt samband við sjúklingin.

**§ 13.** Starvsfólkini á deildini skulu geva sjúklingaráðgevanum allar upplýsingar, sum eru neyðugar fyri, at hesin kann røkja uppgávuna á forsvarligan hátt. Ein upplýsing, sum av læknaligum orsøkum ikki verður givin sjúklinginum, má heldur ikki latast til sjúklingaráðgevan.
*Stk. 2.* Sjúklingaráðgevin hevur rætt til at gera seg kunnugan við upplýsingarnar í tvingsilsprotokollini viðvíkjandi tí sjúklingi, sum hann er tilnevndur fyri.
*Stk. 3.* Sjúklingaráðgevin hevur harumframt rætt til at gera seg kunnugan við innihaldið í journalini hjá sjúklinginum, her undir viðgerðarætlan, um sjúklingurin sjálvur hevði havt atgongd til hetta sbrt. § 20 í anordning nr. 827 frá 30. september 2002 om ikrafttræden for Færøerne af lov om patienters retsstilling, og um sjúklingurin gevur samtykki til, at sjúklingaráðgevin fær atgongd til journalina.

**§ 14.** Sjúklingaráðgevar hava tagnarskyldu.

## Kapittul 4
## Uppathald av tilnevningum v.m.

**§ 15.** Tilnevningin sum sjúklingaráðgevi dettur burtur samstundis, sum tvingsilsinntrivið heldur uppat. Sjúklingaráðgevin skal kunnast um, at tvingsilsinntrivið endar. Er talan um styttri tvingsilsinntriv, sum eru hildin uppat, áðrenn fyrstu vitjanina hjá sjúklingaráðgevanum, dettur tilnevningin ikki burtur, fyrr enn vitjanin hevur verið.
*Stk. 2.* Hóast ásetingina í stk. 1, hjálpir sjúklingaráðgevin sjúklinginum við kærumálum, sum longu eru byrjað, ella sum skulu byrja, tá tvingsilsinntrivið heldur uppat.
*Stk. 3.* Tilnevningin dettur eisini burtur, um tilnevndi sjúklingaráðgevin verður útskiftur við ein annan, sbr. § 8.

**§ 16.** Ein sjúklingaráðgevi kann altíð biðja um at verða strikaður av listanum yvir sjúklingaráðgevar.
*Stk. 2.* Ein sjúklingaráðgevi, sum er á listanum yvir sjúklingaráðgevar, missir sína tilnevning, um hann misrøkir tær skyldur, sum fylgja við tilnevningini, ella hann annars vísir seg ikki at vera skikkaður til starvið. Um tilnevningin verður tikin aftur, skal viðkomandi strikast av listanum yvir sjúklingaráðgevar.
*Stk. 3.* Avgerð um at taka aftur tilnevingina sum sjúklingaráðgevi sambært stk. 2 verður tikin av Føroya Kærustovni.
*Stk. 4.* Tann, sum verður strikaður av listanum yvir sjúklingaráðgevar sambært stk. 1 ella stk. 2, kann ikki verða tilnevndur av nýggjum. Striking sambært stk. 2 hevur harumframt við sær, at verandi tilnevningar detta burtur.
*Stk. 5.* Sjúklingaráðgevar, sum ikki eru á listanum yvir sjúklingaráðgevar, kunnu undir somu treytum, sum nevndar í stk. 2 fáa frá tikið starvið sum sjúklingaráðgevi. Avgerð um hetta verður tikin av Føroya Kærustovni.

## Kapittul 5
## Samsýning

**§ 17.** Avvarðandi sjúkrahús rindar samsýning til teir tilnevndu sjúklingaráðgevarnar, sum eru upptiknir á

listan yvir sjúklingaráðgevar eftir hesum takstum, ið eru ásettir eftir longdini av tí tvingsilsinntrivi, sum sjúklingurin hevur verið fyri:

1) Tvingsilsinntriv, sum vara 0-7 dagar: 900 kr.
2) Tvingsilsinntriv, sum vara 8-30 dagar: 1300 kr.
3) Tvingsilsinntriv, sum vara longri enn 30 dagar: 1800 kr. fyri 3. hvønn byrjaðan mánað.

*Stk. 2.* Er talan um fleiri tilnevningar í styttri tíðarskeið fyri sama sjúkling sbr. § 5, stk. 1, 2. pkt., kann samsýningin fyri tær tilnevningar, sum koma aftan á fyrstu tilnevningina, í serligum førum lækkast til 440 kr. fyri hvørja tilnevning.

*Stk. 3.* Teir í stk. 1 nevndu sjúklingaráðgevar hava eisini krav upp á endurgjald fyri ferðing sambært reglunum fyri starvsfólk hjá tí almenna. Endurgjaldið fæst við at venda sær til sjúkrahúsið.

*Stk. 4.* Sjúklingaráðgevar, sum ikki eru upptiknir á lista yvir sjúklingaráðgevar, hava krav upp á endurgjald fyri ferðing sambært reglunum fyri starvsfólk hjá tí almenna í sambandi við vitjanir upp til fimm ferðir árliga. Endurgjaldið fæst við at venda sær til sjúkrahúsið.

*Stk. 5.* Tær í stk. 1 og 2 nevndu upphæddirnar verða javnaðar árliga samsvarandi lønarbroytingunum á almenna arbeiðsmarknaðinum.

**§ 18.** Tær í § 17, stk. 1 og 2 nevndu upphæddirnar fevna umframt um samsýningina fyri arbeiðið hjá sjúklingaráðgevanum í sambandi við vitjanir, kærumál v.m., eisini um útreiðslur, sum eru knýttar at starvinum, herundir útreiðslur til telefon v.m.

*Stk. 2.* Í heilt serligum førum kann sjúkrahúsið við atliti at arbeiðsbyrðuni hækka ella lækka tær í § 17, stk. 1 nevndu upphæddirnar.

## Kapittul 6
## Sjúklingar innlagdir sambært revsirættarligari avgerð

**§ 19.** Ásetingarnar í hesari kunngerð verða eisini nýttar fyri persónar, sum uppihalda sær á psykiatriskari deild sambært rættaravgerð, sum er tikin í revsisrættarligum høpi, har viðkomandi ikki hevur ein verja sambært § 71 í revsilógini.

## Kapittul 7
## Gildiskoma

**§ 20.** Kunngerðin kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

Heilsumálaráðið, 5. oktober 2009

**Aksel V. Johannesen (sign.)**
landsstýrismaður

/ Poul Geert Hansen (sign.)

Nr. 133 5. oktober 2009

# Kunngerð
# Um
# starvsskipan fyri psykiatrisku sjúklingakærunevndina

Við heimild í § 36, stk. 4 í anordning nr. 185 frá 13. mars 2009 om ikrafttræden for Færøerne af lov om anvendelse af tvang i psykiatrien verður ásett:

## Kapittul 1
## Sjúklingakærunevndin og uppgávur

**§ 1.** Sambært § 34 í anordning om ikrafttræden for Færøerne af lov om tvang i psykiatrien, setir landsstýrismaðurin eina psykiatriska sjúklingakærunevnd.

**§ 2.** Psykiatriska sjúklingakærunevndin viðger kærur um tvingsilsinnlegging, tvingsilsafturhaldan, afturføring, tvingsilsviðgerð, tvingsilsfastspenning, nýtslu av kropsligari megi, verjufastspenning, nýtslu av persónligum ávaringar- og peiliskipanum og serligum hurðalásum, persónligari avbyrging, sum uttan steðg varir í meira enn 24 tímar, og avgerðum um at læsa hurðar á deildini.
*Stk. 2.* Partar í málinum eru sjúklingurin og sjúkrahúsið. Er klagan eisini vend ímóti ávísum heilsustarvsfólkum, eru hesi eisini at meta sum partar í málinum.

**§ 3**. Í viðgerðini av tí einstaka málinum er nevndin mannað við formanni, ið skal vera løgfrøðingur og tveimum limum valdir eftir tilmæli frá Læknafelagnum og Meginfelag teirra Brekaðu í Føroyum ella varalimum teirra.
*Stk. 2.* Føroya Kærustovnur røkir skrivstovuhaldið og rindar útreiðslurnar av virkseminum hjá kærunevndini, her undir eisini samsýning til limir og varalimir. Formaðurin fær eina fasta samsýning. Hinir nevndarlimirnir og varalimir fáa fundarsamsýning sbrt. almennu ásetingunum um nevndarsamsýningar.

## Kapittul 2
## Fyrireiking av málunum

**§ 4.** Sambært § 35 í lógini skal sjúkrahúsið eftir áheitan frá sjúklinginum ella sjúklingaráðgevanum leggja málið fyri psykiatrisku sjúklingakærunevndina.
*Stk. 2.* Sjúklingurin og sjúklingaráðgevin kunnu eisini sjálvir leggja málið beinleiðis fyri psykiatrisku sjúklingakærunevndina.

**§ 5.** Í sambandi við móttøkuna av málinum, ger Føroya Kærustovnur av, um kæran liggur innan fyri málsøkið hjá kærunevndini. Er eingin ivi um, at kæran ikki liggur innan fyri málsøkið hjá nevndini, sendir Føroya Kærustovnur málið víðari til rætta myndugleika og boðar pørtunum frá hesum. Í øðrum førum verður spurningurin viðgjørdur av psykiatrisku sjúklingakærunevndini.

**§ 6.** Í sambandi við móttøkuna av málinum, kannar Føroya Kærustovnur um neyðugu upplýsingarnar eru sendar við, her undir ein frágreiðing um, hvat kæran fevnir um, ein útskrift úr tvingsilsgerðarbókini, ein frágreiðing frá ábyrgdarhavandi yvirlæknanum umframt viðgerðarætlanin.
*Stk. 2.* Leggur sjúklingurin ella sjúklingaráðgevin sjálvur málið fyri psykiatrisku sjúklingakærunevndina, boðar Føroya Kærustovnur sjúkrahúsinum frá kæruni og biður samstundis sjúkrahúsið um at senda nevndini neyðugu upplýsingarnar, sbrt. stk. 1.
*Stk. 3.* Føroya Kærustovnur syrgir annars fyri, at málið verður lýst og tekur avgerð um at fáa til vega møguligar aðrar frágreiðingar v.m.

**§ 7.** Nevndin ella ein av limunum, sum frá nevndini fær heimild til tess, kann í sambandi við viðgerðina av einum ítøkiligum máli, vitja avvarðandi psykiatrisku deildina.

## Kapittul 3
## Fundir

**§ 8.** Føroya Kærustovnur ásetir tíð og stað, har fundir verða hildnir. Formaðurin stýrir fundunum.
*Stk. 2.* Fundirnir hjá nevndini verða hildnir á psykiatrisku deildini, har sjúklingurin er ella hevur verið innlagdur í sambandi við ta tvingsilsatgerðina, sum klaga verður um uttan so, at tað ikki er ráðiligt at halda fundin á deildini.
*Stk. 3.* Formaðurin kann gera av, at mál, sum hava serligan skund, her undir kærur um avgerðir um tvingsilsviðgerð, sum sambært § 32, stk. 3 í lógini vanliga hava steðgandi virknað, skulu viðgerast, áðrenn onnur mál, sum eru innkomin fyrr.
*Stk. 4.* Sjúklingurin, sjúklingaráðgevin, sjúkrahúsið, avvarðandi yvirlækni og møguliga onnur viðkomandi heilsustarvsfólk fáa boð um tíð og stað fyri fundum í psykiatrisku sjúklingakærunevndini, har tað einstaka málið skal viðgerast.

**§ 9.** Sjúklingaráðgevin skal sambært § 24, stk. 2, 3. pkt. í lógini í mest møguligan mun vera til staðar, tá málið verður viðgjørt í nevndini. Tað sama er galdandi fyri læknan, sum hevur tikið avgerð um tvingsilsatgerðina, sum kært verður um.
*Stk. 2.* Sambært § 36, stk. 2 í lógini hava sjúklingurin og sjúklingaráðgevin rætt til munnliga at greiða nevndini frá málinum. Sama rætt hava umboð fyri sjúkrahúsið, avvarðandi yvirlækni og onnur viðkomandi heilsustarvsfólk.
*Stk. 3.* Í serligum førum, har atlit til heilsustøðuna

hjá sjúklinginum ella til viðgerðina í nevndini avgjørt tala fyri tí, kann nevndin gera av, at sjúklingurin heilt ella lutvíst skal verða avskorin frá at luttaka í umrøðuni, sbrt. § 36, stk. 2, 2. pkt. í lógini.

**§ 10.** Fundirnir hjá psykiatrisku sjúklingakærunevndini eru ikki almennir.

## Kapittul 4
## Avgerðir v.m.

**§ 11.** Psykiatriska sjúklingakærunevndin skal sbrt. § 36, stk. 3 í lógini taka avgerð í kærumálum um tvingsilsviðgerðir, sum hava steðgandi virknað sbrt. § 32, stk. 3 í lógini, innan 7 dagar frá tí, at kæran er móttikin.
*Stk. 2.* Í øðrum málum skal psykiatriska sjúklingakærunevndin taka avgerð skjótast gjørligt. Er avgerð ikki tikin innan 14 dagar frá tí, at nevndin hevur móttikið kæruna, skal nevndin boða sjúklinginum og sjúklingaráðgevanum frá orsøkini til hetta, umframt nær avgerð væntandi verður tikin.

**§ 12.** Avgerðir hjá kærunevndini verða tiknar við vanligum meiriluta aftan á munnliga atkvøðugreiðslu.
*Stk. 2.* Avgerðin verður førd í eina gerðabók. Limirnir kunnu krevja at fáa eina stutta grundgeving fyri teirra støðutakan førda í gerðabókina.
*Stk. 3.* Avgerðir hjá kærunevndini skulu vera skrivligar og grundgivnar og skulu siga, hvørt tað er ein samd nevnd ella ein meiriluti, sum stendur aftan fyri avgerðina. Avgerðirnar verða undirskrivaðar av formanninum, ella øðrum, sum formaðurin hevur givið heimild til tess.

**§ 13.** Avgerðin hjá psykiatrisku sjúklingakærunevndini verður send pørtunum í málinum.

**§ 14.** Avgerðir hjá psykiatrisku sjúklingakærunevndini kunnu vera, at ein tvingsilsatgerð verður góðkend, ella at henda verður mett at verða framd av órøttum.
*Stk. 2.* Verður kært um avgerð um tvingsilsviðgerð, kann nevndin góðkenna ella ógilda hesa avgerð. Hetta er eisini galdandi, um kæran viðvíkur tí tilbúning ella teirri skamtan, sum er ásett í avgerðini. Psykiatriska sjúklingakærunevndin kann ikki ávísa aðra tilbúning ella aðra skamtan.
*Stk. 3.* Er kæran eisini vend ímóti tí ella teimum heilsustarvsfólkum, sum hava tikið lut í kærdu tvingsilsnýtsluni, tekur psykiatriska sjúklingakærunevndin støðu til, um grundarlag í hesum sambandi er fyri at finnast at teimum.

**§ 15.** Psykiatriska sjúklingakærunevndin almannakunnger á hvørjum ári eina frágreiðing um virksemi nevndarinnar. Frágreiðingin verður gjørd í samstarvi við avvarðandi psykiatrisku deildirnar.

## Kapittul 5
## Kærumøguleiki og kæruvegleiðing

**§ 16.** Psykiatriska sjúklingakærunevndin skal eftir áheitan frá sjúklinginum ella sjúklingaráðgevanum leggja avgerðir sínar viðvíkjandi tvingsilsinnlegging, tvingsilsafturhaldan, afturføring, tvingsilsfastspenning, verjufastspenning og læsan av hurðum á deildini fyri rættin eftir reglunum í kap. 43 a í rættargangslógini. Málið skal leggjast fyri rættin innan 5 yrkadagar frá tí, at áheitan um hetta er móttikin.
*Stk. 2.* Avgerðir hjá psykiatrisku sjúklingakærunevndini um tvingsilsviðgerð, nýtslu av kropsligari megi, persónligum ávaringar- og peiliskipanum og serligum hurðalásum, persónligari avbyrging, sum uttan steðg varir í meira enn 24 tímar, kunnu kærast til Sundhedsvæsenets Patientklagenævn.

**§ 17.** Psykiatriska sjúklingakærunevndin skal vegleiða sjúklingin og sjúklingaráðgevan um møguleikan at royna málið í rættinum sambært kap. 43 a í rættargangslógini.
*Stk. 2.* Nevndin skal eisini vegleiða um, at áheitan um at leggja málið fyri rættin eftir reglunum í kap. 43 a í rættargangslógini skal verða sett fram innan 4 vikur frá tí, at nevndin hevur tikið avgerð, og at rætturin í undantaksføri kann loyva fráviki frá freistini, um serligar orsøkir eru til tess, tá áheitan verður sett fram seinni, tó innan 6 mánaðir aftan á avgerðina.
*Stk. 3.* Psykiatriska sjúklingakærunevndin skal harumframt kunna sjúklingin og sjúklingaráðgevan um, at nevndin leggur málið fyri rættin, og at rætturin tilnevnir ein advokat fyri sjúklingin, um hesin ikki sjálvur hevur fingið sær ein advokat.
*Stk. 4***.** Psykiatriska sjúklingakærunevndin skal eisini vegleiða pørtunum í málinum um møguleikan at kæra aðrar avgerðir hjá nevndini til Sundhedsvæsenets Patientklagenævn.

## Kapittul 6
## Gildiskoma v.m.

**§ 18.** Limirnir í psykiatrisku sjúklingakærunevndini hava tagnarskyldu.

**§ 19.** Kunngerðin kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

Heilsumálaráðið, 5. oktober 2009

**Aksel V. Johannesen (sign.)**
landsstýrismaður

/ Poul Geert Hansen (sign.)

FØROYAPRENT

Hefti 26 • Nr. 130-133 • Útgivið tann 9. okt. 2009